TING-HELLAN

# Guds persónliga tsunami

TINGHELLUVIÐ MERKINGIN
*Jenis á Rana*
*rana@post.olivant.fo*



Hon rakar óvæntað og meint, á køldum føroyskum vegum og á sólgyltum, pálmaklæddum strondum í Fjareystri- køvandi sorgin. So meinings- og miskunnarleyst verða tey rivin burtur, høg sum lág, rík og fátøk, ung og aldrandi.

Hvar er Gud í øllum hesum, hoyrdist ein spyrja nú um dagarnar.

Dagur var, tá eisini Hann misti, enntá sítt einasta og besta, einkarsonin. Um nakratíð, so hevði Harri og Skapari Himins og jarðar tá bæði motiv og mátt at steðga oyðanini og deyðanum, men Hann gjørdi tað ikki. Gav hann eftir fyri freistingini, var við eitt øll vón úti fyri okkum menniskjum, og sorgarleikir, sum hesar dagar so miskunnarleyst raka, høvdu verið fyri lítið at rokna.

Gjølla varð størsta bjargingarætlan, søgan veit um at siga, løgd til rættis. Uppgávan var greið, øll mannaættin var í vága, einasta bjarging var at Faðirin sendi einkarsonin til jarðar. Men støðan var enn daprari , tí tey neyðstaddu fóru, og tað vistu Faðirin og sonurin fullvæl, at havna bjargingarroyndini, fóru at forfylgja og at enda gera av við Frelsaran. Men hetta var einasta loysnin.

Tað er fullgjørt, ljóðaði boðskapurin av Golgata, dagin tá bjargingargrundarlagið var fullført. Eingin mannaætlan, eingin ágangur manna, hevði megna at forða stórstu bjarging søgan veit frá at siga.

Síðani henda dagin er eingin sleptur upp á fjall, hvussu stór sorgin og vanlukkan enn hava verið. Við friði og gleði hevur kærleiksfulli hjálparin verið á vitjan, í smáttu og borg, hjá ríkum og fátækum, høgum og lágum.

Her hjá okum, eins og í fjareystri, vitjar Hann við sínum av naglum merktu hondum, troystar og lekir, endurreisur og veitir vón. Aftur og aftur berast søgur um hetta, her heiman og úr fjarskotnum londum.

## Hvat kann tsunami vanlukkan læra okkum?

Hon kann knýta okkum tættari at Honum, sum heldur á at veita hjálp sína, tá sjálvt frægastu hjálparfelagsskapir noyðast at gevast. Og hon kann leiða okkum til Hansara, sum í hjálp sínari ynskir at brúka teg og meg og tey evni, teir møguleikar og tað tilfongi, sum Hann hvønn dag lutar við tey, sum standa honum tøk.

Tær krónur, privatar ella almennar, sum okkum unnist at geva, eru allar givnar okkum av Honum. Hvønn dag tráar Hann eftir at stýra viðurskiftum okra, so vit kunnu gerast før fyri at verða partur av tí lívgevandi virksemi, sum Hann ynskir at veita Skapanarverki sínum- her í ríkum norðuratlantsoyggjum ella í fjarastu av tsunami raktu.

Eingin missir við at geva eftir leiðslu og hjartalagi Hansara. Ríkari, og á allan hátt signaður, verður hin einstaki og tann tjóð, sum letur upp hond sína fyri tí treingjandi, og tað kundi verið tú ella eg- sum taldust millum hesi.

## Lat okkum í felag leggja lunnar undir enn størri hjálparарbeiði!

Tá tsunami og okkara óskiljandi heimligu sorgarleikir, eru komnir í fjarstøðu, heldur neyðin tó á hjá summum. So var eisini áðrenn seinna jóladag, dagin tá kreftur jarðarinnar bardust. "Vit her í Kongo hava 11. septembur hvønn dag"- ljóðaði herfyri frá hjálparmanni. Hann stríddist eitt fyri hann vónleyst stríð móti valdsgerðum, sum menniskju miskunnarleyst framdu móti sjálvt verjuleysum kvinnum og børnum í av menniskjum gloymdum økjum. Í túsundatali doyðu og doyggja hvønn dag, uttan at vit frætta stórvegis, menniskju skapt í somu mynd sum tú og eg.

Lat takksemi og hjálpsemi fylla okum, okum sum fingu forrættin at verða fødd í landi, sum av røttum kann kallast forgarður paradís. Lat okum í felag, meðan tsunami og heimligu sárini lekjast, leggja lunnar undir eitt enn størri og dagligt hjálparарbeiði, sum fer at náa tey, sum valla megna at rópa neyðarrópið, so tað hoyrist. Gera vit tað, hevur tsunami, hóast sorgarleikur av teim stórstu, megna eisini at borið gott við sær. Megna at veitt hjálp til teirra, sum hava mist vónina- í Sudan, Kongo, Indonesia, Norðurkorea, í flóttafólkalegum heimin runt- listin er langur og longri.

Men hjálp tín og mín, borin víðari frá Honum, sum skapti ein útveg, kann stytta hann!

---

Trúboðarar gera seg eisini galdandi í hjálparарbeiðnum:

# Trúboðarar millum tey fyrstu á vanlukkustaðnum

**Teir vóru komnir har frammanundan. Nógvir høvdu verið har í áravís. Teir dugdu málið og vóru staðkendir. Teir brutu eisini upp um armar og fóru til verka - meðan mong okkara enn hildu jól og ikki høvdu fingið stundir at fara undir hjálpar- og innsavningararbeiði**

TINGHELLUKRONIKKIN
*Páll Poulsen*
*ppo@post.olivant.fo*

Eingin føroyskur trúboðari var á nøkrum vanlukkustaði, men Sørin Joensen, útsendur frá samkomuni Betel í Vági og Ebenezer í Havn, kom til Tailands fyrst í oktober, har hann virkar saman við trúboðarafelagsskapinum New Tribes Mission. Hann og hollendska kona hansara Corina hava verið í Føroyum í summar og í heyst. Tey eru langt frá vanlukkuøkinum, har tey skulu virka millum fjarskotnar ættarbólkar. Júst nú eru tey í ferð við at læra seg tailendska málið.

## New Tribes Mission millum teir fyrstu at hjálpa til

Trúboðarafelagskapurin New Tribes Mission, sum nógvir føroyingar kenna, hevur fleiri trúboðarar í Tailandi. Fyrstøðumaður fyri henda felagskapin, sum hevur fleiri enn 3.000 trúboðarar kring knøttin, er klaksvíkingurin Óli á Grømma Jacobsen, sum býr í USA. Teir hava fleiri trúboðarar bæði í Indonesia og Tailandi.

## Hjálpa læknum uttan landamørk

Í Indonesia er virkisøki hjá New Tribes Mission langt frá vanlukkuøkinum. Felagsskapinum "Læknar uttan landamørk" tørvaði onkran, ið kundi tosa indonesiskt raðið, sum hevði royndir at fáa brennievni til tyrlur og sum var álítandi. Teir bóðu Tim Whatley, trúboðara hjá New Tribes Mission um at hjálpa sær.

Tim hjálpir einum læknaliði og virkar sum tolkur fyri tyrluflogskiparan og fólk, sum gera brúk av tyrlutænastuni. Hann samskipar flogferðir og syrgir fyri brennievni. Eftir at hava flogið í eina viku sigur Tim, at hann var skelkaður og ørkymlaður av ræðuligu oyðingini, hann hevur sæð.

## Hjálpa til í Tailandi

Í Tailandi hjálpa tveir trúboðarar hjá NTM til. Annar teirra er Dave Percy, ein trúboðari sum hevur royndir í fyrstuhjálp. Stjórnin í Tailandi sóknaðist eftir fólki, sum dugdi tailendska málið og onnur mál og sum høvdu royndir í medisinskum hjálparарbeiði. Dave fór fyrst á sjúkrahúsið í Phuket, men hjálpir nú einum læknaliði, ið virkar fram við strondini í Tailandi.

Frank Hildebrandt hjálpir kristnum í vanlukkuraktu økjunum í Tailandi og hjálpir teimum at skipa fyri at býtu út neyðhjálparútgerð í smábygdunum í vanlukkuøkinum.

Pam Davis dugir eisini tailendskt og hevur eina útbúgving í ráðgeving. Hon undirvísir og lærir tailendingar at geva landsmonnum sínum kreppuhjálp. "Eg eri so ómetaliga takksom fyri, at eg dugi tailendskt nóg væl, so eg kann undirvísa tailendingum í at geva kreppuhjálp," sigur hon. " Eg eri takksom fyri mína útbúgving sum ráðgevari, og at eg á henda hátt kann hjálpa til."

## Brøðrasamkoman trúboðarar á vanlukkuøkjunum

Samkoman Betesda í Colombo, Sri Lanka, er virkin í neyðhjálpini. Áðrenn ein vika var farin, høvdu teir sent ein lastbil við neyðhjálparútgerð, sigur George Thomas vegna samkomuna. Brøðrasamkomur í Malaysia sendu við tað sama eina bingju við hjálparútgerð til Sri Lanka.

## Brøðrasamkoman í India

Ron Phenny, bretskur trúboðari, koyrdi beinanvegin til vanlukkurakta økið í India at kanna umstøðurnar. Hann greiðir frá, at tað var ræðuligt at síggja standin í sjónvarpinum, men tað var mangan verri, tá ein kom á staðið. Har er nú so nógv hjálparfólk komið, at tey hindra hvør øðrum. Har tørvar samskiping. Matur stendur og rotnar úti á gøtuni, og fólk vaskaðu sær við mineralvatni úr fløskum.

Eitt eygnavitni greiddi frá, at fyrst kom stórur súður við eini aldu, so nógvur livandi fiskur lá og spraklaði á sandinum, tá tað súðaði út. Fólk vóru ikki greið yvir vandan og tustu oman á sandin at fáa sær nakrar dýrabærar fiskar. Tá kom fyrst ein og so ein annar brotasjógvur. Fólk skríggjaðu og runnu undan, men nú var ovseint! Túsundtals menniskju doyðu og yvir hundraðtúsund hava mist hús og heim og materielli skaðin er ómetaliga stórur..

## Brøðrasamkomur í Phuket, Tailandi

Bretski trúboðarin Peter Ferry sigur, at fyrsta neyðhjálpararbeiðið hevur gingið væl. Har eru nógvir læknar og neyðhjálparfólk á ringast raktu økjunum, og nóg mikið er av neyðhjálparútgerð. Hóast fleiri trúgvandi eru í samkomunum her, so doyði eingin, Fleiri í samkomunum duga enskt, og hava hava hjálpt til sum tolkar. Nógvir menn í samkomuni eru útróðrarmenn. So at siga allir útróðrarbátarnir eru vrak ella mugu fáa stórar umvælingar. Materielli skaðin er stórur.

## Malaysia

Bretski trúboðarin Eric Kirton sigur, at Malaysia varð spart, tí oyggin Sumtra lá fyri og vardi, men Aceh landsparturin er hart raktur. Eisini økini Penang og Lankawi.

## Føroysku brøðrasamkomurnar skipa eisini fyri hjálp

Vegna samkomur av brøðrum í Føroyum átekur føroyski hjálparfelagsskapurin Kristniboðssambandið, stytt KBS, sær at taka ímóti peningi til neyðhjálp og fáa hann víðari. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við Echoes of Service, sum er hjálparfelagskapur hjá bretskum brøðratrúboðarum. Hesin felagsskapur sendi góðar 700 túsund krónur beinanvegin, sum teir høvdu tøkar til slík endamál. Kristniboðssambandið hevur konto í peningastovnunum. Merk gávuna: Hjálparарbeiði Asia.

## Øll í sama báti

Í slíkum viðurskiftum verður ikki gjørdur munur á trúgv - hvørki hvør skal fáa hjálpina ella hvørjum samarbeitt verður við undir neyðhjálparарbeiðinum. Sum eg skilji riggar tað í flestu førum, men havi eisini frætt, at onkustaðir eru víðgongdir muslimar, sum ikki brýggja seg um tað.